SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Tað var ósømiligt og óvirðiligt at háða Saddam Hussein, tá hann bleiv avrættaður*

*George W. Bush*

# USA frystir

**Kuldin hevur fingið myndugleikarnar at lýsa tríggjar statir í undantaksstøðu**



*Klaki hevur slitið fleiri elleidningar, og fleiri hundraðtúsund amerikanarar hava mist streymin*

Tað hevur verið óvanliga kalt nógvastaðni í USA teir seinastu dagarnar, og sambært myndugleikunum hava minst 42 fólk latið lív, tey flestu í ferðsluvanlukkum á teimum hálu vegunum.

Sjálvt í Kalifornia, sum er kent fyri sítt góða veðurlag, er bítandi kalt, og Arnold Schwarzenegger, guvernørur, sigur, at har hevur kuldin kostað bøndrunum næstan eina milliard dollarar í mistari grøði.

Kuldin hevur serliga gjørt um seg í statunum Oklahoma, Missouri, Kalifornia og Texas, og tríggir teir fyrstu eru lýstir í undantaksstøðu. Í gjár frysti 17 stig. Nógvastaðni er klaki lagstur á elleidningarnar, so teir eru slitnaðir, og tí hava fleiri hundraðtúsund fólk ongan streym. Í gjár sendu myndugleikarnir í Oklahoma hjálparfólk út við generatorum og drekkivatni til fólk, sum liggja í streymloysi.

Í Dallas í Texas var so hált á flogvallunum, at loftferðslumyndugleikarnir noyddust at avlýsa umleið 500 fráferðir.

Streymloysið hevur havt við sær, at fólk hava ongan hita í húsunum. Fleiri hava brent bensin fyri at hita húsini, og í nøkrum førum hevur tað havt við sær, at fólk eru deyð av roykeitran, skrivar AP.

Veðurstovan í Texas boðaði í gjár frá stormi, og eysturi í New York og Maine vórðu fólk ávarað um frost.

# Navnið kann forða honum at gerast forseti



*Barrack Obama ger alt fyri at fáa fólk at gloyma, at hann eitur Hussein til millumnavn, tí tað kann maðurin í Hvítu Húsunum ikki eita.*

**Navnið spillir ongan, men kann ein amerikanskur forseti eita Hussein til millumnavn?**

Fær senatorurin Barrack Obama sín vilja, verður hann tann fyrsti svarti forsetin í USA. Í gjár handaði hann valnevndini eina fráboðan um, at hann er til reiðar at stilla upp, men hann hevur ein trupulleika. Á navnabrævinum, sum fylgdi við fráboðanini, sæst, at hann eitur ikki bara Barrack Obama, men Barrack Hussein Obama. Júst millumnavnið kann vísa seg at gerast ein meinbogi, tí nógvir amerikanarar fara at hava ilt við at góðtaka, at ein amerikanskur forseti skal eita Hussein.

Tað var Barrack Obama væl, og tí brúkar hann ikki millumnavnið longur. Í einari bók, sum hann gav út stutt eftir atsóknirnar tann 11. september í 2001, skrivar hann, at hann fekk eina áheitan frá sínum demokratisku ráðgevum um at strika millumnavnið, tí tað kundi gerast ein politiskur trupulleiki.

Hansara republikonsku mótstøðumenn gera haraftursmóti alt fyri at minna fólk á, hvussu senatorurin í Illinois eitur, og tað gjørdi ikki støðuna betri, tá ein sjónvarpsvertur hjá CNN var mismæltur og kallaði senatorin Osama ístaðin fyri Obama. Er Husseinnavnið illa umtókt í USA, er Osama uppaftur verri.

Tann 10. februar fer Barrack Obama undir valstríðið, sum eftir hansara ætlan skal enda við, at hann verður tann fyrsti svarti forsetin í USA aftan á valið næsta heyst.

## STUTT SAGT

### Hundur leyp á

Ein 25 ára gomul svensk kvinna fekk stóran skaða í andlitið, tá ein hundur av slagnum pitbull leyp á hana um vikuskiftið. Blaðið Ny Wermlands-Tidningen sigur frá einum av skurðlæknunum, sum viðgjørdu kvinnuna, at hetta er tað ringasta hundsbitið, sum hann hevur sæð. Løgreglan heldur, at tað var 27 ára gamli fyrrverandi unnusti hennara, sum beitti hundin eftir kvinnuni fyri at hevna, at hon gav honum krakk fyri nøkrum døgum síðni.

### Eldur í fartelefon

Tann 59 ára gamli amerikanarin Luis Picaso, sum gisti á einum hotelli í Kalifornia leygarkvøldið, varð illa brendur, tá eldur kom í fartelefonina, sum hann hevði í lummanum. Eldurin festi í klæðini beinanvegin og breiddi seg um alt kamarið, so spuliskipanin á hotellinum fór í gongd. Tá sløkkiliðsmenninir komu á staðið, lá Luis Picaso hjálparleysur á gólvinum. Hotellstjórin sigur, at eldurin gjørdi skaða fyri 75.000 dollarar. Í Svøríki kom eldur í eina fartelefon í november í fjør, men hon lá á einum borði, so fólkaskaði var eingin.

### Líktist hevnd

George W. Bush, forseti, ásannar nú, at framferðin, sum bleiv nýtt, tá Saddam Hussein bleiv tikin av døgum, var óheppin og hevur gjørt støðuna í Irak uppaftur verri. Í samrøðu við sjónvarpið PBS sigur Bush, at tað var ikki rætt av teimum hjástøddu at háða Saddam, og at tilburðurin minti mest um hevnd. Bush legði afturat, at tað, sum hendi í avrættingarhølinum, gav fólki ymiska uppfatan av viðurskiftunum og var enn ein tekin um, at irakska stjórnin er ikki búgvin enn og hevur nógv eftir at læra.